Amoco væl áleiðis við kanningunum:

Tað sær gott út

-Føroyingar hava dugað væl at vekja áhugan hjá oljuídnaðinum fyri føroyska landgrunninum. Tað er helst eindømi í allari verðini, at so nógvar seismiskar kanningar eru gjørdar av einum nýggjum øki, so tíðliga í útviklinginum heldur George Chisholm

JAN MÜLLER

George Chisholm, kanningarstjóri hjá Amoco her saman við Robert Clark, kanningarstjóra umborð á ferjuni um Vestmannasund. Mynd Jónhard.

Fleiri av oljufeløgunum, sum hava gjørt av at brúka tíð og orku til at vera við í leitingini eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum eru komin rættiliga væl áleiðis í sínum arbeiði. Eitt av hesum feløgum er tað stóra amerikanska oljufelagið AMOCO.

Felagið telist millum tey stóru oljufeløgini í heiminum og kann samanberast við feløg sum Mobil og Texaco, ið eisini eru við á føroyska økinum.

Amoco var við í Lopransboringini í fjør heyst men hevur annars hildið rættiliga lágan profil, tá talan er um at stíga fram alment.

George Chisholm er kanningarstjóri hjá Amoco og hevur hann júst verið í Føroyum saman við tveimum av sínum starvsfeløgum, Robert Clark, sum hevur ábyrgd mótvegis fjølmiðlunum og myndugleikunum og Torunn Bukkholm, sum starvast hjá Amoco Norway, har hon er serkøn innan skatta-, fíggjar- og lógarspurningar.

Tey trý hava ikki ynskt at gera nógv hóvasták burtur úr vitjanini, sum meira er at meta sum ein arbeiðsvitjan.

-Hetta verður bert ein stuttur steðgur. Vit eru komin higar fyri at læra og kunna okkum við viðurskiftini og hava í hesum sambandi tosað við nøkur fólk frá Oljuráðleggingarnevndini, Føroya Oljuídnað oo. sigur George Chisholm, sum vísir á, at tey hava tosað um lógarmál, fíggjarspurningar, trygging og so eisini um støðuna á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Saman við føroyingum

Hann vísir á, at Amoco ynskir at brúka føroyska arbeiðsmegi í eini komandi oljuvinnu, men at felagið ynskir at tilrættaleggja framtíðar gongdina í tøttum samstarvi við føroyingar. Av tí at samfelagið er so lítið vil Amoco bert taka stig, sum føroyingar halda tænir samfelagsgongdini annars. Og fyri Amoco er talan um langtíðarplanleggíng. Tað er slíkari, sum henda ferðin er ætlað at skapa eitt sunt og trygt grundarlag undir.

Í hesum sambandi verður eisini hugt at møguleikanum at lata upp skrivstovu í Føroyum. Hetta kann longu koma uppá tal næsta ár, men tað veldst so sjálvandi um viðgerðina av oljulóggávuni og hvussu áhugaverð undirgrundin er til ta tíð.

George Chisholm sigur, at eitt felag sum Amoco sjálvandi eisini hyggur at øðrum økjum í verðini og metir um, hvar tað er skilabest at gera íløgur. Hjá Amoco er teir annars sera ernir av kanningarúrslitunum seinastu árini. Í fjør var Amoco tað oljufelagið í heiminum, sum fekk mest burtur úr sínl leiting, og fyrrárið lá felagið sum nr. 2. Tað er hesa styrki, sum felagið nú ætlar at brúka í Føroyum eisini.

Í løtuni standa Føroyar rættiliga frammaliga á skránni hjá felagnum. Bert kanningararbeiðið krevur í løtuni 30 fólk, og helst verður neyðugt at víðka hetta tal sohvørt tað nærkast eini lisensrundu.

Føroyar trygt stað

Hann sigur, at Amoco vigar fyrimunir og vansar upp móti hvørjum øðrum, tá avgerast skal, hvar íløgur í leiting skulu gerast.

Vit hyggja eftir lógarkarminum, tí teknisku risikoini og sjálvandi eisini tí politisku risikoini. Vit halda Føroyar vera eitt politiskt stabilt økl sammett við nógvum onnur lond.

Hvat viðvíkur teimum turbulentu viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, so metir kanningarstjórin hjá Amoco hesi ikki so álvarslig. -Tað er sjálvandi ein óvissa knýtt at hesum, men munur er á tí og so møguleikanum fyri terrorismu, tjóðartøku og bráddligum lógarbroytingum, sum tú ikki hevði hóming av frammanundan. Slík viðurskifti rokna vit ikki við at møta í Føroyum sigur hann. Hóast ein hevur hoyrt lítið til Amoco í sambandi við føroyaøkið, so verður tað arbeitt sera miðvist á teimum ymsu deildunum hjá Amoco í bæði London, Tulsa og Houston.

Tey hava útvegað sær tað mesta av tøka seismiska tilfarinum og hava viðgjørt hetta. -Vit eru um at vera liðug við fyrstu fasu, og eg má viðganga, at tað sær gott út. Men nakrar kanningar her serstakliga serviðgerð av data eru eftir at gera.

George Chisholm sigur, at hóast teir eru rættiliga bjartskygdir, so eru fleiri ivamál at loysa. -Vit siggja, at løgini, sum eru á bretskari síðu halda fram inn á føroyskt øki, men her skapar tjúkka basaltið trupulleikar, sum idnaðurin tó arbeiðir við at loysa.

Uppá fyrispurning um Amoco er komið so mikið langt við kanningunum, at teir eru tilreiðar at søkja um lisens í føroyskum øki sigur George Chisholm, at ein spurningur, sum er av týðandi at svara, er um tað verður nóg lønandi at bora gjøgnum basaltið. Teir fara at arbeiða meira við hesum, áðrenn avgerð verður tikin um at søkja um loyvi at bora eftir olju leggur hann aftrat.

Føroyingar telvað vel

Annars heldur George Chisholm, at føroyingar hava dugað væl at skapa áhuga fyri føroyska landgrunninum. Tað hevur eydnast føroyskum myndugleikum at gera økið tilgongiligt á ein sera effektivan hátt og at fáa seismisku feløgini fyri egna rokning at skjóta seismikk og her ikki minst 3D, sum er sera kostnaðarmikið.

-Eg havi verið við í oljuleiting nógva staðni í heiminum og má siga, at tað, sum hendir í Føroyum, er eindømi. Hetta gagnar sjálvandi oljufeløgunum, tí tey harvið hava minni útreiðslur í byrjanini og kunnu tí brúka meira orku uppá aðrar uppfylgjandi kanningar. Men føroyingar hava so sanniliga eisini gagn av hesum. At feløg sum PGS og Digicon longu hava gjørt 3D kanningar við Føroyar økir sjálvandi eisini um áhugan hjá oljufeløgunum. Og tá fleiri feløg vilja keypa data og viðgera tað longu fyri harvið at skilja økið betí og skjótari, so gagnar hetta føroyingum, harvið kenna og skilja sína undirgrund nógv skjótari og betri enn onnur lond, har oljuleiting tekur seg upp.

Georg Chisholm vísir á, at við hesum útviklingi fáa føroyingar eisini fleiri meiningar og metingar um undirgrundina. Úrslitið kann verða, at ein fær eina nógv greiðari og kanska eisini fjølbroyttari mynd av undirgrundini, enn um lítið varð kannað á verandi støði.

Hvat viðvíkur tí stóra áhuganum frá oljufeløgunum fyri økinum so heldur George Chisholm, at vit mugu rokna við, at onkur feløg taka seg aftur, tá avgerð skal takast um tær stóru íløgurnar. Her er djúpt, nógvur streymur og borútreiðslurnar verða stórar. Tað fer helst at fáa okkurt felag at umhugsa støðuna og heldur gera íløgur aðrastaðni. Kortini fara at verða so mikið nógv feløg eftir, at her verður ein kapping - men alt hetta er tengt at lógini og teimum treytum, sum verða settar í sambandi við 1. útbjóðingarumfar. Hetta verður so samanborið við onnur øki í heiminum.

Hvat annars viðvíkur boring við Føroyar so heldur Amoco-stjórin, at tað neyvan er sannlikt, at tað verður borað fyrr enn í 99 ella ár 2000. Hann roknar við, at tað kanska verða gjørd eini 2-3 góð fund áðrenn ár 2003.

Vilja býta operatørleikut

Nú fleiri av oljufeløgunum hava skipað seg í oljusamtøk spurdu vit George Chisholm, um ikki Amoco ætlar sær at arbeiða saman við øðrum feløgum!

-Vit halda okkum hava tað mesta av ekspertisuni, sum brúk er fyri í løtuni. Vit vilja tó vera liðligir og fara at taka ta tíð, sum er neyðug fyri at finna partnarar. Vit ætla at vera operatørur, men tað veldst sjálvandi eisini um, hvørjir hinir samstarvsfeløgini eru. Vit eru møguliga eisini hugaðir fyri at býta leiklutin sum operatørur við onnur stór felóg.

Teir eru í løtuni í samráðingum við fleiri onnur feløg um samarbeiði.

Uppá fyrispurning um eitt oljufelag einamalt kann megna hesa uppgávu sigur hann, at tað sjálvandi ber til. Teir vilja í hvussu er hava onkran at býta risikoina við og tað er eisini gott við fleiri ymiskum feløgum í einum bólki.

George Chisholm sigur annars, at teir taka uppgávuna í Føroyum sera álvarsliga. -Vit vilja gera alt fyri at fáa eitt gott úrslit sigur hann og vísir á, at tað er umráðandi at kunna brúka hæði royndirnar og vitanina frá bretskum øki og Hvíta økinum fyri at skilja føroyska landgrunnin betur.

Jarðfrøðin tann sama

Kanningarnar vísa annars, at løgini, sum eru bretsku megin markið, tvs. har fundini Foinaven og Schiehallion eru gjørd, halda fram vestur eftir inn á Hvíta økið fyri so at hvørva undir basaltinum á føroyskum øki.

Endamálið er at kunna skilja alt hetta stóra økið og til tess er neyðugt við nógvum kanningararbeiði føroysku megin Hvíta økið.

George Chisholm váttar, at tey økini, sum eru mest áhugaverð í løtuni, eru tey, ið liggja sunnan og eystan fyri Føroyar, nærhendis umstríddu økjunum.

Kann ganga báðar vegir

Vit spurdu hann, um vónirnar til at gera fleiri og størri fund við Føroyar eru størri enn tey, sum eru gjørd vestan fyri Hetland.

-Tað er enn so nógv óvissa knýtt at føroyska økinum, at tað er ringt at svara tí. Men tað kann vera. Hinvegin kann tað eisini vera júst øvugt, at møguleikin fyri olju og gassi tess nærri tú nærkast Føroyum er minni.

Brúk er fyri góðum reservoirum - goymslum - og so góðum sandsteini. Tann sandsteinurin, sum finst í Foinaven og Schiehallion fundunum er genereraður av eldri sandsteini av Hetlandsleiðunum og verður hann helst tynri sohvørt ein nærkast Føroyum. Møguleiki er fyri, at eingin sandsteinur er sprottin av føroyska økinum, tí har hevur bara verið basalt omaná basalt. Men sum sagt er alt hetta so óvist.

George Chisholm er eins og øll onnur oljufeløg ikki serliga fegin um, at eingin loysn er funnin á marknatrætuni millum Føroyar og Bretland. Hann heldur, at Hvíta økið er alt ov áhugavert til at liggja niðurbundið.

At enda spurdu vit hann, hvussu Amoco fer at fyrihalda sær fyri Greenpeace, sum ætlar at forða oljufeløgunum at leita eftir olju á Atlantsmótinum!

-Vit halda okkum til tey krøv, sum bretska stjórnin setir, og oftani fara vit enn longur. Trupulleikin við Greenpeace er tann, at meðan vit royna at brúka upplýsingar og vitan g vísindaliga, so føli eg tað so, at Greenpeace onkuntíð bert tekur ávísar upplýsingar burtur úr eini heild og brúkar teir út frá egnum áhugamálum.

Hann vísir við hesum m.a. til tíðindini frá Greenpeace herfyri um, at tað varð gjørt ein sera avdúkandi uppdagin millum Føroyar og Hetland. Eitt korralriv varð funnið, sum eingin visti um áður. Hetta sokallaða korralriv, sum als ikki er nakað riv men ymisk øki við korralluni, varð fyrstu ferð uppdagað í 1856.

-Tað kann so vera, at hetta er nýtt fyri Greenpeace, men tað er tað ikki fyri okkum sigur Georg Chisholm, sum vísir á, at tað skjótt kemur ein grein í New Scientist, sum viðger júst henda spurningin.